


FÓLKATINGSVALIÐ 13. NOVEMBER 2007 LØGTINGSVALIÐ 19. JANUAR 2008




# Føroyskan forsætisráðharra á flatlondum!



Val
PÁLL Á REYNATÚGVU
løgtingsmaður og valevni til fólkatingsvalið

Letur tú teg stilla upp til kommunuval, kann tú gerast borgarstjóri. Letur tú teg stilla upp til løgtingsval, kann tú gerast løgmaður. Letur tú teg stilla upp til fólkatingsval, kann tú gerast forsætisráðharri á flatlondum. Soleiðis er skipanin, og hon skal nýtast til fulnar í royndunum at vinna føroyingum tjóðarfrælsi.

**Misskilt politisk uppgáva**

Seinastu nógvu árini hava føroysku fólkatingssessirnir verið røktir, sum eitt slag av føroyskum sendistovuvirksemi í Keypmannahavn. Ørindarenning fyri hendan og handan einstaklingin, sum kann vera mikið væl. Kunningarfundir og ráðstevnur, sum kann vera mikið væl. Fjølmiðlaspinn og gykl, sum kann vera mikið væl. Har hevur verið spælt eitt skuggaspæl við lobbylótum, sum hevur skula legitimera, hví tjóðveldi stillar upp til fólkatingsval, og samstundis sagt at vit ikki skulu blanda okkum uppí danskan politikk. Men eru alt hettar nú í trá við ætlanina við fólkatingssessunum. Greiða svarið er nei!

**Frá lobbysimu, til politiskt vald**

Siga vit ja til skipanina við fólkatingsvali, so siga vit ja til at troyta allar teir politisku møguleikar, sum eru í skipanini. Einki við at spæla fólk í húsi. Einki við at umbera okkara hjáveru í fólkatinginum. Einki við at krúpa undan teirri ábyrgd, sum fylgir við vera valdur í eitt parlament. Er tú inni í skipanini, so ræður um at fáa so nógva ávirkan sum gjørligt, eins og við øllum øðrum fólkaræðisligum sessum. Politiskar semjur og demokratiskar atkvøðugreiðslur er dagsskráin, og tíðin har vit knarra uttanfyri ávirkan, skal avloysast av smílandi ávirkan innanfyri múrarnar. Soleiðis tryggja vit áhugamálini hjá okkara veljarum sum frægast, og tað er rætta náttúran í politikki.

**Úr forhøllini, og innar í stjórnarstovurnar**

Við verandi politisku støðu í Danmark, har hvør fólkatingssessur kann gera av, hvør verður stjórnarleiðari, og hvørjir vera leikbrøður hennara, er føroyska ávirkanin á fólkatingi í eini lyklastøðu. Vit hava møguleikan at flyta okkum innar í politiska hitan á Christiansborg, innar í stjórnarstovurnar, um væl ber til. Og hesin møguleikin skal ikki gleppa okkum av hondum. Við taktiskum tevi, og sniðfundigum snildi, ber til at telva seg, til búgvi borð.

**Frá Janta til Jeppa**

Skuldi tú ivast í um tað finnast tjóðveldisrøddir, sum søkja politisku ávirkanina á Fólkatingi, so nýtist tær ikki at ivast longur. Tí eg bjóði meg fram sum bygdadreingin, sum søkir beint inn í hjartað á politisku skipanini á flatlondum. Og har vera allir politiskir møguleikar nýttir, í royndini at ávirka donsku politisku skipanina innanífrá. Fólkatingsvalið skal nýtast til vald og ávirkan, føroyska samfelagnum at gagni.

Vit flyta okkum frá Janta til Jeppa, eisini um avleiðingin verður, at tín atkvøða, ger undirritaða til føroyskan forsætisráðharra á flatlondum.

# Politikkarar ignorera ekspertar

Val
RÓALDUR JÁKUPSSON
HD/U, vinnurekandi
Tjóðveldisvalevni

Búskaparfrøðingar verða ignoreraðir og láturliggjørdir av politikarum, og Hagstovan sleppur ikki at framleiða røttu hagtølini og amboðini, sum eru fortreyt fyri at stýra landinum...

Hetta má broytast!

# Tað snýr seg um álit, virðing og fólkaræði



Val
HØGNI HOYDAL
Tjóðveldisflokkurin

Vit hava allar møguleikar at taka burtur forðingar og skipa eitt frælst samfelag í vøkstri og menning. Forðingarnar liggja í politisku skipanini.

Vit skulu hava greiða kós og skapa álit í føroyskum politikki.

Tann smáligi valdsbardagin og royndirnar at keypa sær atkvøður her og har, fyri síðani at renna undan ábyrgd, tá veruligar avgerðir skulu takast, skapar misálit og vantandi áhuga millum fólk fyri politikki.

Øll kunnu vit helst semjast um, at:

Okkara viðurskifti við Danmark skulu greiðast. Vit kunnu ikki vera hvørki, og tað ræður um, at politisku flokkarnir ikki liggja og berjast handan stongdar dyr um okkara framtíðarstøðu, men at fólk mugu sleppa at taka støðu á eini fólkaatkvøðu

Okkara atgongd út í heim til altjóða samstarv skal greiðast. Vit kunnu ikki vera hvørki ella Kongeriget Danmark for så vidt angår Færøerne.

Almanna- og heilsumálini skulu hugsast heilt av nýggjum við vitan og hagtølum, loysnir eftir tørvi hjá veikastu bólkunum og gjøgnum altjóða samstarv millum fakbólkarnar í heilsuverkinum.

Útlendingamálini mugu loysast undir egnari ábyrgd

Rættartrygdin og rættindini og skyldurnar hjá okkum øllum mugu ásetast í føroyskari grundlóg og í eini almennari skipan, har skeivar avgerðir og mismunur fáa avleiðingar.

Vinnulívspolitikkurin og umsitingin av okkara felags tilfeingi skal greiðast.

Umhvørvispolitikkurin og okkara altjóða ábyrgd skal gerast annað enn uttanumtos.

Útbúgving og gransking skal setast ovast í okkara raðfestingunum

Okkara samleiki skal styrkjast við miðvísum mentanarpolitikki.

Tey, sum í dag sita við leiðsluni hava ikki boðini ella nakra kós til at fremja hesi mál.

**Fimm greið hjartamál**

Tjóðveldi hevur sett okkara greiðu kós og okkara politisku mál fram í 5 hjartamál. Vit kenna tað soleiðis, at føroyska samfelagið hevur allar møguleikar at standa á egnum beinum og at ganga fram - og at viljin til ábyrgd og frælsi er ovurstórur: Í vinnulívinum, millum fakfeløg, millum starvsfólk allastaðni, á bygd og í bý – ja, millum fólk sum heild.

Forðingin liggur í eini politiskari skipan, ið ikki vil skapa álit – men heldur vil skriva álit og síðani sleppa undan at taka støðu.

Vit skulu hava virðing og álit á okkum sjálvum. Og vit skulu støðugt halda fast um eitt veruligt fólkaræði – har vit hava ábyrgd av øllum viðurskiftum.

Tjóðveldi virkar fyri hesum málum í Føroyum, á Fólkatingi og í altjóða samstarvi.

Fólkatingsvalið er eisini møguleikin hjá øllum føroyingum at seta kós og at skapa álit.

# Ein nýggj byrjan: Vel John á Fólkating



Val
JOHN JOHANNESSEN
www.john.fo

Vit skulu hava eina nýggja byrjan. Tað er avgerandi neyðugt, at Føroyar fáa ræði á sínum egna uttanríkispolitikki. Tí vil eg sum fólkatingslimur virka fyri einum nýggjum samstarvi við danir, har valdsbýtið millum partarnar verður ásett í nýggjum sáttmála, sum leggur lunnar undir avgerðir á føroyskum grundarlag.

**Málið er:**

- At Føroyar fáa standandi heimildir at samráðast við onnur lond og gera sáttmálar við tey.
- Karmurin um samstarvið millum Føroyar og Danmark verður ein sáttmáli, har valdsbýtið millum partarnar er ásett. Hesin sáttmáli verður fráboðaður ST, og verður harvið tryggjaður í altjóðarætti.
- Nýggi sáttmálin kemur í staðin fyri heimastýrislógina, sum fer úr gildi.
- Sáttmálin skal tryggja, at Føroya Løgting og Føroya Landsstýri verða hægstu myndugleikar og evsta vald í øllum málum, sum eru undir føroyskum málsræði.
- Tann danska grundlógin verður ikki longur galdandi í Føroyum. Men Føroyar og Danmark eru tó enn saman gjøgnum eitt tætt samstarv, sum tó nú byggir á eitt javnari grundarlag gjøgnum Frælsa Felagsskapin.

# Dupultumboðan er hálv umboðan



Val
HELENA DAM Á NEYSTABØ
Javnaðarflokkurin

Føroyar høvdu fingið nógv størri nyttu av fólkatingsumboðunum, um tey vóru í Fólkatinginum burturav og ikki, sum nú, bæði í Løgtinginum og í Fólkatinginum. At okkara fókatingsumboð hava røkt løgtinssessin fram um fólkatingsessin hevur gjørt, at nógvir týdningarmiklir menningarmøguleikar eru farnir fyri skeytið.

Føroya Løgting er evsta vald í Føroyum, og arbeiðið í Løgtinginum krevur eitt fólk fult og heilt. Men fólkatingssessurin krevur eisini eitt fólk fult og heilt, um sessurin verður tikin í álvara. Tí er henda dupultumboðanin skeiv. Soleiðis hugsa tey eisini aðra staðni. Í Danmark loyva flokkarnir t.d. ikki, at sami persónur umboðar flokkin bæði í fólkatinginum og í EU-parlamentinum. Um ein fólkatingslimur verður valdur í EU-parlamentið, leggur hann fólkatingssessin frá sær, soleiðis at hann ella hon kann leggja alla sína orku í EU-politikkin.

Eg ivist ikki í, at tað hevði verið ein fyrimunur fyri føroyingar og Føroyar, um okkara fólkatingumboð vóru fólkatingumboð burturav.

Um nøkur meining skal vera í hjá føroyingum at hava umboð í fólkatinginum, so eigur minsta kravið at vera, at føroyskt vinnulív, føroyskt mentunarlív, útbúgvarskipan okkara, granskingin og ikki minst politiska skipanin fær nógv størri nyttu av hesari uttanlandsumboðan.

Dupultumboðan er bert hálv umboðan.